umhvørvisstovan

Argir hin 24. oktober 2012
Málsnr.: 12/00464-1
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: MGH

## Frá 1. januar 2014 er halón ólógligt

Við hesum fara Umhvørvistovan og Sjóvinnustýrið at minna reiðarar og onnur á, at halón er ólógligt umborð á skipum frá 1. januar 2014.

Halón hevur í nógv ár verið brúkt sum eitt sera virkið eldsløkkingarevni, bæði á landi og umborð á skipum. Tíanverri vísti tað seg, at halón eisini er eitt sera sterkt ozonoyðandi evni, sum ger, at ozonlagið verður brotið niður og tynnist. Ozonlagið verjir lívið á jørðini móti skaðiligum ultraviolettum strálum frá sólini. Tá ozonlagið tynnist, økist títtleikin av ymiskum sløgum av húðkrabba og eygnasjúkum. Eisini gróðurin í sjónum, og harvið eisini fiskiskapur, kann minka tá ozonlagið tynnist.

Fyri at verja ozonlagið hava øll heimsins lond í einum aljóða sáttmála bundið seg til at steðga framleiðslu og nýtslu av halóni og øðrum evnum, sum bróta ozonlagið niður. Sambært Montreal- protokollini skuldi øll framleiðsla og nýtsla av halóni í ídnaðarlondum steðga í 1994. Í ES hevur bann verið fyri nýtslu av halóni umborð á skipum síðani 1. januar 2004.

Í kunngerðini um ozonoyðandi evni frá 2010 er í §6, stk. 2 ásett, at eldsløkkiskipanir, eldsløkkjarar og annar útbúnaður, sum inniheldur halón, skulu vera tikin úr nýtslu innan 31. desember 2013. Sí heimasíðu okkara www.us.fo (undir lóggávu).

Hetta merkir, at øll skip undir føroyskum flaggi, sum enn sigla við eldsløkkiskipan, ið brúkar halón, skulu skifta hesa út innan ársskiftið 2013/2014.

Niðurtøka av fastbygdum eldsløkkiskipanum umborð á skipum, herundir halónskipanum, kann einans útinnast av virki, sum er góðkent av Sjóvinnustýrinum til slíkt arbeiði. Sí heimasíðuna hjá Sjóvinnustýrinum www.fma.fo (undir Skipaeftirlit/Løggilding – undirveitarar/Fastbygdar eldsløkkiskipanir umborð á skipum). Arbeiðið skal fremjast sambært vegleiðing 14/2012 hjá Umhvørvisstovuni um niðurtøku av eldsløkkiskipanum við halóni, sum er hjáløgd.

Les meira um ozonoyðandi evni á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni www.us.fo undir Dálking og Vernd/Luft og veðurlag/Ozonoyðandi evni.

Hetta brævi er sent øllum viðkomandi reiðaríum og feløgum. Um tit hava spurningar hesum viðvíkjandi, kunnu tit seta tykkum í samband við Umhvørvisstovuna ella Sjóvinnustýrið.

**Umhvørvisstovan og Sjóvinnustýrið**